## DAGSINS MEINING

# Sorgarleikur

Sorgarleikurin í Miðeystri heldur fram, og endi tykist ikki vera á ræðuleikunum í Ísrael, í hersettu palestinsku økjunum og í Iraq. Stríðið millum Ísrael og víðgongdu palestinsku bólkarnar er nú farið út um alt mark, og eingin tykist førur fyri at steðga harðskapinum. Hóast roynt hevur verið leingi at finna eina politiska loysn, hevur tað hvørja ferð eydnast teimum víðgongdu at steðga hesum royndum. Málið hjá teimum víðgongdu er at provokera ávikavist Abbas og Sharon til at taka til harðskap hvørja ferð ein politisk loysn er komin í ljósmála. Tíverri hevur hetta eydnast teimum víðgongdu hvørjar ferð, og hetta er mikið spell.

Tað krevur eitt ómetaligt tol og stórt politiskt dirvi at finna politiskar loynsir í tí kaosi av harðskapi og hatri, sum eyðkennir partar av Miðeystri. Og henda støða leggur eina ómetaliga politiska ábyrgd á Ísrael og á USA. Tað er neyðugt at ásanna, at tað nyttar einki at løna harðskapi við harðskapi. Tað er neyðugt at viðurkenna Abbasstjórnina sum ein javnsettan samráðingar- og samstarvspart. Hetta merkir, at haldast má fram við politisku samráðingunum uttan mun til, hvussu nógv harðskapurin enn økist. Fyrr ella seinni fer ein meiriluti av palestinensum at ásanna, at einasta gongd leið til varandi frið er at finna eina politiska loysn og at viðurkenna, at Ísreal er komið fyri at vera.

Hinvegin má Ísrael viðurkenna rættin hjá palestinensisku tjóðini til at stovna sín egna stat. Soleiðis var jú upprunaliga ætlanin hjá ST og stórveldunum í 1948, og henda støðan eigur at verða grundarlagið fyri framtíðini hjá báðum tjóðum. Men ein politisk loysn er í sjálvum sær ikki nóg mikið. Báðar tjóðir noyðast at læra at virða hvørja aðra. Herfyri var sending í SvF, sum avdúkaði tað sínamillum hatur og agg, ið eyðkenna viðurskiftini millum palestinensar og ísraelsfólk. Hetta hatur verður lagt niður í børnini í dagstovnum og í skúlum. Slíkt førir bert til meira harðskap. Heldur enn at læra børnini at hata, áttu viðkomandi myndugleikar og foreldur at lært børnini at virða øll uttan mun til lit, átrúnað ella tjóðskaparligt tilknýti. Júst her liggur kanska lykilin til framtíðina í økinum. Men hesin lykil verður neyvan tað fyrsta partarnir, ið taka til og tað er mikið spell, tí ikki minst børnini í báðum tjóðum eru offur fyri tí áhaldandi harðskapinum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Framtaks(Gávu)grunnur Bjarna Djurholms

**Johan Dahl**
*løgtingsmaður*



**Partabrøv sum gáva**
Tað var ikki sørt ørkymlandi at lesa í vikuni, at landsstýrismaðurin í vinnumálum, nú eisini er farin við á gávuvognin.

Tær kr 93.000.000, sum Framtaksgrunnurin ikki í løtuni er førur fyri aftur-gjalda til landsstýrið, skjýtur landsstýrismaðurin upp skulu konverterast til at geva uml. kr 2.000 til hvønn føroying sum gáva í form av partabrævi (slík gáva er skattskyldug inntøka) – álvaratos – hvat er tað vert fyri hesar 48.000 føroysku sálirnar??

Landskassin fær um ikki annað helvtina innaftur sum skattur, tí gávan er skattskyldug

**Hvat verður søluvirði av Fiskavirking aftan á at gávan er effektuerað?**
Við einum – eftir hesum uppskoti – uttan iva veingjaskotnum Føroya Fiskavirking við umleið 48.000 partaeigarum, verður sera áhugavert at síggja, hvussu nógvir – um nakar yvirhøvur, verður áhugaður at hyggja í eitt søluprospekt umrøðandi Føroya Fiskavirking; tað verið seg føroyingur ella útlendingur.

Ímyndið tykkum eisini sirkusið á hvørjum ári, tá aðalfundir verður – tað verður ein sera kostnaðarmikil aðalfundur og ikki sørt skemtiligur.

Álvaratos – er tað ikki upp á hægstu tíð at tit í samgonguni blíva bara eitt lítið sindur seriøsir og um ikki annað, so finnað út av, hvat tænir teimum feløgum best, ið ætlandi skulu einskiljast í framtíðini, ístaðin fyri at spæla idiot rætt og slætt við ørligum uppskotum – og latið so nevnd og leiðslu Framtaksgrunnsins fáa arbeiðsfrið at selja fyritøkur sínar uttan politiska uppílegging – so grunnurin m.a. verður førur fyri at gjalda tær 93 mio kr, hann skyldar aftur í landkassan sum ivaleyst skjótt fær hart brúk fyri upphæddina.

# Mótmæli móti framferðarhátti Starvsmannafelagsins

**Dánial á Dul Jacobsen**



Sum limur í Starvsmannafelagnum mótmæli eg framferðarháttinum hjá Starvsmannafelagnum nú, vinnumálaráðharrin Bjarni Djurholm boðaði fakfeløgunum til fundar. Sjálvandi átti Starvsmannfelagið at verið møtt á fundinum. Undanførslan við at fundurin fall saman við annan týdningarmiklan fund hjá felagnum heldur ikki, tí um vilji var til staðar, so var annar fundurin fluttur, ella so møtti í minsta lagi eitt umboð fyri nevndina í Starvsmannafelagnum. Men júst viljin er tað, sum skortar. Tað er nú eingin loyna. Tað kemur eisini týðuliga til sjóndar í greinum í Dimmalætting og Sosialinum mikudagin. Orðini: »Haldið fingrarnar burtur« siga alt.

Tað tykist aftur hesa ferð, sum um formaður starvsmannafelagsins gloymir, at limir felagsins eisini eru borgarar í samfelagnum og hava á demokratiskum grundarlagi valt tey politisku umboðini. Hetta er meir enn sigast kann um valið av umboðum í nevnd starvsmannafelagsins. Fyri at kunna velja limir í nevndina hjá Starvsmannafelagnum skalt tú møta á fundi. Sambært grein hjá Finnboga Ísakssyni í Fregnum herfyri, so var hetta hátturin, ið nýttur varð til løgtinsval fyri hálvtannaðhundrað árum síðani. Sum vera man so var valluttøkan lítil tá, og tað er hon eisini í dag, tá tað ræður um val av umboðum í nevndina hjá Starvsmannafelagnum. Hetta veit Starvsmannafelagið og lagar valini eftir umstøðum. So hóast felagið telur 1750 limir, so rúmar valhølið sjáldan fleiri enn 300-400 fólkum, og sjáldan man vera fullsett. Tá so hugsað verður um tað ógvusliga vald nevndin hevur, so kann núverandi háttur at velja nevnd als ikki góðtakast. Hetta gerst uppaftur grefligari, tá hugsað verður um demokratiska munin millum samráðingarpartarnar: Fíggjarmálaráðharrin og nevnd Starvsmannafelagsins. Fíggjarmálaráðharrin settur av løgmanni, sum er valdur av løgtinginum, sum er valt á vali, har meir enn 90% av føroyingum við valrætti hava valt og so nevnd starvsmannafelgasins, sum er vald av einum fátalið av limunum.

Havandi hetta í huga er ikki meir enn rætt og rímuligt, at lóggivið verður fyri viðurskiftunum á arbeiðsmarknaðinum. Minstamark má vera, at valdið hjá fakfelagsnevndum til einsamallar at senda limir sínar í verkfall verður tikið frá teimum. Uratkvøða eigur at vera ásett við lóg og skipað soleiðis, at limirnir hjá ymsu fakfeløgunum sleppa at atkvøða á neutralum staði. Fastur gerðarrættur at loysa ósemjur á arbeiðsmarknaðinum eigur at vera settur ongantíð ov skjótt.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# 60 FHS-næmingar á Svangaskarði

**Páll Isholm, deildarstjóri, heldur, at tiltøkini hjá skúlanum at samansjóða næmingarnar eru týdningarmikil og gevandi.**
**- Tað hevur stóran týdning, at næmingarnir læra hvønn annan at kenna. Hetta er fyritreytin fyri trivnaðinum, sigur hann**



*60 FHS-skúlanæmingar av Kambsdali vóru savnaðir á Svangaskarði á Toftum mikudagin og hósdagin – til samansjóðing*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

SAMANSJÓÐING
*Vilmund Jacobsen*

Ymiskt er, hvat gjørt verður burtur úr fyrstu skúladøgunum á skúlunum kring landið. Tey smáu, sum fara fyrstu ferð í skúla, hava sín tørv á at læra hvønn annan at kenna. Summi eru smæðin og kenna seg ótrygg; onnur eru meira opin fyri tí nýggja og ókenda.

Tey hálvvaksnu ella vaksnu, sum ikki hava verið í stovu saman áður, hava eisini sín tørv á at læra hvønn annan at kenna.

Bæði hjá børnunum, teimum hálvvaksnu og vaksnu hava teir fyrstu skúladagarnir stóran týdning fyri trivnaðin, og hvat nú einaferð spyrst burtur úr í skúlanum.

### Stórt tiltak

Føroya Handilsskúli á Kambsdali ger nógv burtur úr at samansjóða næmingarnar í byrjanini av skúlaárinum.

Allir flokkarnir á skúlanum fara í fyrstu vikuni út saman. Í ár er tað soleiðis, at teir tríggir FHS-flokkarnir hava verið savnaðir á Svangaskarði á Toftum eitt samdøgur, teir tríggir 1.HH-flokkarnir hava verið á Háskúlanum í Havn, og 2.HH-flokkur hevur verið í Sandavági.

Mikudagin vitjaði Sosialurin á Svangaskarði. Tá ið vit vóru fram við stutt fyri middag hendan dagin, vóru 60 næmingar saman við fýra lærarum savnaðir úti á graslíkisvøllinum til ymiskar kappingar og spøl. Tey togtogaðust, runnu á hondum og beinum, spældu ymisk spøl við posum, sum skúlin hevði lánt frá Havsbrún, royndu kynstur á bummum og spældu við lítlum bóltum ímillum sín.

Seinnapartin hendan dagin skuldu øll verða við í postarenning ymsastaðni í bygdini. Her skuldu tey í bólkum finna postar, sum góvu teimum ymiskar hugsandi og óhugsandi uppgávur. Ein var at fara oman á Fiskamarknaðin at gita nøvn á fiskasløgum, ein onnur at finna eitthvørt livandi kykt, helst eitt kombikk ella eina maðkapirru, livandi heim við.

Um kvøldið skuldu tey saman hyggja at landsdystinum millum Føroyar og Ísland – á Svangaskarði!

Ein áhugaverd uppgáva hjá hvørjum flokki sær var eisini at gera eina sonevnda »grundlóg« – ella floksskipan, sum er galdandi fyri skúlastovuna og floksviðurskiftini annars. Endamálið við hesum er at skapa rætta trivnaðin í flokkinum, sum er ein fyritreyt fyri, at tað besta spyrst burtur úr tíðini í skúlanum.

Seinni um kvøldið var kvøldseta við ymiskum undirhaldi, og her skuldu flokkarnir so eisini leggja fram sína grundlóg.

### Góðar umstøður

Páll Isholm, deildarstjóri, sigur, at umstøðurnar á Svangaskarði til slík tiltøk eru ómetaliga góðar.

- Umstøðurnar kunnu ikki hugsast betur. Vit gista her eina nátt og matgera sjálvi.

Hann heldur, at tiltøkini hjá skúlanum at samansjóða næmingarnar á henda hátt eru týdningarmikil og gevandi.

- Tað hevur stóran týdning, at næmingarnir í FHS-flokkunum læra hvønn annan at kenna. Nøkur fá kennast, áðrenn tey koma í flokkin. Onnur kennast slett ikki. Á henda hátt læra øll hvønn annan at kenna á ein hugnaligan hátt, og tað hevur stóran týdning, heldur Páll.

Sama er galdandi fyri hinar flokkarnar, har øll ikki hava verið í flokki saman áður, tí flokkar eitt nú eru lagdir saman.

Mánadagin fingu flokkarnir á Handilsskúlanum á Kambsdali tímatalvu, og næmingar høvdu høvi at fylla út umsóknarbløð um studning. Týsdagin fyrireikaðu tey seg til mikudagin, tá ið allir flokkarnir fóru út til samansjóðing. Hósdagin, meðan tey enn ikki vóru afturkomin av ferðini á Háskúlanum, Sandavági og á Toftum, fyrireikaðu tey seg til næmingaráðsvalið, sum verður í dag.

Mánadagin komandi byrjar so vanligi skúladagurin á Kambsdali.

### Nýggir lærarar

Páll Isholm sigur, at 18 lærarar eru á Føroya Handilsskúla á Kambsdali. Av hesum eru 5 nýggir lærarar í ár.

- Hetta er stór útskifting frá einum skúlaári til annað, men vit fara at gera okkara besta til tess geva næmingum eina so góða og holla upplæring, sum vit saman eru før fyri, sigur deildarstjórin.



*Saman við fýra lærarum, hugnaðu teir 60 FHS-næmingarnir sær óført á Toftum. Á myndini síggja vit tveir av lærarunum, Páll, deildarstjóra og Doris, sum sleit sínar barnaskógvar á Toftum*